Álit

í

løgtingsmáli nr. 34/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar (Útsetan av javning)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 30. september 2020, og eftir 1. viðgerð 8. oktober 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. oktober 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landsfelag Pensjónista, Megd saman við Sinnisbata, Javna og Diabetesfelagnum, og við landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Uni Rasmussen, Rósa Samuelsen, Erhard Joensen og Jóhan Eli Poulsen) tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg, Hervør Pálsdóttir og Aksel V. Johannesen) mælir staðiliga frá at samtykkja uppskotið við hesum viðmerkingum:

Áralanga arbeiðið við at fáa gjørt eina pensjónsnýskipan bar á mál í seinastu samgongu. Eitt av uppskotunum, sum bleiv samtykt, var at fáa javningina í fasta legu. Løgtingið samtykti, at frameftir skuldu almannaveitingarnar javnast við støði í miðaltalinum av brúkaraprístalinum og lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum. Hetta fyri at tryggja, at veitingar kunnu fylgja við so hvørt sum alt dýrkar.

Tað er ein sannroynd, at almannaveitingarnar høvdu tørv á at koma í fasta javningarlegu, tí javningin var ov tilvildarlig og almannaveitingarnar vóru afturúrsigldar, tí í fleiri ár var als ikki javnað. Tí er tað so ómetaliga harmiligt og átaluvert, at samgongan velur, at almannaveitingarnar ikki skulu javnast longu fyrsta árið, sum skipanin skuldi koma í gildi.

Tað er óskiljandi, at allar sparingarnar hjá samgonguni skulu raka tey fólk, sum hava minst fíggjarligt rásarúm í samfelagnum. Hyggja vit eftir, hvussu samgongan annars hevur býtt virðini í samfelagnum, soleiðis at tey, sum hava mest fáa enn meira, samstundis, sum tey sum hava minst onki fáa, so meta vit, at hetta uppskot er við til at økja sosiala ójavnan í samfelagnum og ger livikorini hjá fólkapensjonistum, fyritíðarpensjonistum, einkjum og einkjubørnum, støkum og fólki sum fáa forsorgarhjáp enn truplari. Hesum politikki taka vit frástøðu frá og mæla Løgtinginum til at fella uppskotið.

Minnilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 20. oktober 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Aksel V. Johannesen

Hervør Pálsdóttir

Rósa Samuelsen

Jóhan Eli Poulsen

Erhard Joensen